# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Joan Joensen 50



Í dag fyllir Joan Joensen í Esbjerg 50 ár. Joan er ættað úr Norðragøtu, men búði í Havn í fleiri ár, áðrenn hon og familjan fluttu til Danmarkar fyri átta árum síðani.

Aftan á skúlan arbeiddi Joan á Klædnavirkinum og á Harenga í heimbygdini. Síðani var hon eina vertíð á Flateyri og í Ólafsvík í Íslandi, og heimafturkomin fór hon at arbeiða í handli, og tað gjørdi hon í mong ár. Fyrst var hon í handlinum hjá Eiler Rasmussen, fotografi í Klaksvík, áðrenn hon flutti til Havnar. Har byrjaði hon hjá Good Look, sum tá helt til á Landavegnum, og seinni var hon hjá Jacob Lútzen á Áarvegnum. Tá SMS kom, fór Joan hagar at arbeiða. Ta fyrstu tíðina var hon á matstovuni, men seinni var hon hjá Hans Joensen og í barnahandlinum Pinkuni. Tey seinnu árini arbeiddi Joan í byggibúðini hjá Balslev og seinast á Shell-støðini á Norðara Ringvegi. Joan varð væl dámd sum handilskvinna. Altíð brosandi og altíð til reiðar at hjálpa viðskiftafólkunum.

Síðani tey fluttu til Danmarkar, hevur Joan passað sonin, sum er menningartarnaður. Hon er gift við Árna Joensen, og tey eiga eisini eina dóttur.

Bogi Samuelsen, Tórshavn:

## 30 ára starvsdag hjá Skipafelagnum Føroyar



Fríggjadagin 15. apríl 2005 hevði Bogi Samuelsen í Havn 30 ára starvsdag hjá Skipafelagnum Føroyar.

Bogi er ættaður úr Sumba, og bæði foreldrini eru haðani. Hann flutti sum smádrongur til Havnar, tá pápin Jóhan Samuelsen byrjað sum lærari á Sjómansskúlanum.

Bogi er útbúgvin stýrimaður og skipsførari og eftir at hava siglt sum yvirmaður í nøkur ár, byrjaði hann sum 35 ára gamal í pakkhúsinum hjá Skipafelagnum Føroyar í Havn. Í dag arbeiðir hann sum søluráðgevi hjá felagnum.

Starvsfelagarnir ynskja Boga hjartaliga tillukku við degnum.

### Jacoba Benjaminsen sjeyti

Hósdagin, 21. apríl, fyllir Jacoba Benjaminsen á Nesi sjeyti ár.

Dagurin verður hildin leygardagin, 23. apríl, hjá soninum, Harry Benjaminsen á Toftum.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við vitjan, heilsanum og telefonpráti, gleddu meg og gjørdi mær 85 ára føðingardagin til ein minnisríkan dag, takki eg hjartaliga

**Petur Vilhelm, Vágur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
tá ið kæri maður, pápi, abbi og langabbi

**Kjartan Gregersen**
Syðrugøta

andaðist og varð borin til hvíldar.

Tøkk til Martin Restorff Jacobsen og Martin Olsen
fyri góð orð í kirkjuni og Paula Høj fyri góð orð
í kapellinum og Lisu fyri vakran sang.
Tøkk til kirkjutænarar og tykkum, sum hjálptu
sera væl til við ervinum og tykkum,
sum góvu gávu til Kelduna.
Tøkk til øll, ið fylgdu honum til hvíldar.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Má Harrin signa tykkum øll.

**Inger Katrin og Fróði v/ familju**

Sosialurin

# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:....................................................
Bústaður:....................................................
Bygd/býur:..............................Tel:....................
Evt. arbeiðspláss:....................................................

Merkisdagurin er: ....................................................

Innsendari: ..............................Tel:....................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 34 18 00/21 61 35, fax 34 18 01, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 45 86 86, fax 45 86 87, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 44 78 20, fax 44 95 20, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 37 53 64, fax 37 54 64, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 33 38 20, fax 33 37 20, teldupost: edvard@sosialurin.fo